








# Gomul fyritøka í jólahýri

**Skós í Klaksvík er gamal handil, ið selur skógvar. Nú jólini nærkast, er handilin á tremur við nýggjum vørum, og tey eru eisini klár, nú frítt er at koyra til Klaksvíkar leygardagin**




Skós í Klaksvík hevur mong ár á baki. Tað var Eliesar Joensen, eisini róptur Skós, ið byrjaði virksemið fyri eini 70 – 80 árum síðani.

Handilin var í somu familju til 2006, tá annar eigari tók yvir. Fyri tveimum árum síðani tók núverandi eigari við.

### Skógvar til øll

Hjá Skós fáast skógvar til ung og eldri, kvinnur og menn. Ja, til ber at siga, at her fáast skógvar til alla familjuna.

Skógvar eru í alskyns sniðum og litum, og eittnú fáast eisini inniskógvar til børn og vaksin hjá Skós.

### Vetur og jól merkjast

Hjá Skós eru tey í jólahýri og handilin er á tremur við nýggjari vøru.

Jólini merkjast, og eisini merkist, at kavin er komin, tí nógv vilja hava stivlar og vatntættar skógvar. Og hjá Skós er úrvalið stórt, so har er ongin vandi.

Jólahýrurin er komin, og eisini eru tey klár at taka ímóti, nú frítt er at koyra ígjøgnum Norðoyatunnilin leygardagin.